# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Døma uttan rættarmál

Rættarmálið ímóti fyrrverandi irakiska einaræðisharranum gongur móti endanum. Saddam Hussein var sunnumorgunin dømdur til deyða. Rættarmálið heldur tó fram við fleiri ákærum. Vit í Vesturevropa ganga ikki inn fyri deyðadómi. Vit hava tó onga ávirkan á henda dómin, tí tað eru irakar sjálvir sum døma sambart irakiska lóg. Men flest øll munnu ganga inn fyri, at øll slík mál fara rættarinnar veg.

Tað kom tí ómetaliga dátt við, tá Dimmalætting í oddagrein í gjár rør framundir, at best hevði verið um Saddam hevði verið skotin uttan rættarsøk. Blaðið skrivar m.a.: "Nógv hampafólk í Vesturevropa munnu ikki leggja so nógv í, um maðurin verður dripin – hann hevði ikki betur uppiborið, og fleiri av okkum munnu kanska eisini ilskast inn á, at tað ikki hvepti í onkrum peikifingri, tá Saddam varð tikin til fanga, tí um hann tá hevði verið skotin, høvdu bæði Irak og umheimurin sloppið undan hesi og øllum komandi rættarmálum, ið kunnu tykjast óneyðug, tí úrslitið er so gott sum givið frammanundan."

Henda óhugnaliga og ódemokratiska niðurstøða stríðir ímóti øllum tí, sum vit í Vesturheiminum standa fyri, nevniliga at øll hava rætt til at fáa sína søk viðgjørda í einum rætti, sjálvt einaræðisharrar og drápsmenn skulu rættarsøkjast antin sambart altjóða lóg ella landsins lógum. Eingi sakarmál eru óneyðug. Tey eru tvørturímóti ein sjálvfylgja. Eru ein av grundarsteinunum undir fólkaræðinum, fólkarættinum.

Hvat sigur Amnesty til slíkar nýggjar tónar í føroysku pressuni! Henda niðurstøða er eftir okkara tykki so langt úti, at talast má at. Og Dimma átti eisini at vitað, at eitt sakarmál umframt demokratiska prinsippið hevur stóran týdning fyri eftirtíðina. Í dag viðger rætturin í Bagdad hópmorðini á kurdar. Eitt sera týdningarmikið mál at fáa umrøtt og lýst, og sum amerikanarar við Romsfeld á odda valdu at venda blinda eygað til og eftir hesa skemdargerð stuðlaðu Saddam í krígnum móti Iran.

Tað undrar okkum og helst fleiri, at Dimmalætting ger sína ódemokratisku niðurstøðu í hesum máli – at vilja fella dóm uttan rættarmál. Spurt kundi í hesum viðfangi verið, um hetta er vorðið nýggja linjan hjá blaðnum, tí herfyri feldi oddagrein dóm yvir Jenis av Rana, uttan at maðurin er ákærdur. Tað er ikki okkara uppgáva at døma. Øll hava rætt til eina fair og ærliga rættarviðgerð.

**Sosialurin**

## Samgongan handlaði skjótt við Bussmálinum.

**SJÚRÐUR OLSEN**
Býráðslimur í Havn



Greinin í Sosialinum mánadagin 30. oktober um børn í Kollafirði, sum koyra ókeypis til Havnar í skúla, fekk samgonguna at handla í óðum verki tríggjar dagar seinni við at seta ókeypis busskoyring fyri øll í verk.

Teir hækka koyringina frá 11 mill. kr. til næstan 15 mill. kr. Hvar pengarnir skulu koma frá, verður onki nevnt um. Kanska teir kunnu hækka kostnaðin fyri bátaplássini enn meir, ella taka enn meir frá vinnuni í ruskgjaldi.

Fíggjarætlaðin fyri 2007 er langt síðan samtykt. Eg kundi kanska tikið undir við og diskutera ókeypis koyring til skúlanæmingar, men vaksin hava ráð at gjalda kr. 200,- um mánaðin og pensionistar gjalda kr. 100,-.

Nú tá tað er ókeypis koyring koma heilt vist onnur krøv frá fólki. Sum komu noyðast fólk á Argjaboða sum nú er at ganga líka heim til Argjaskúla til fyrsta steðgiplássið. Hava tey og onnur í somu støðu ikki rætt at fáa bussin nærri, nú tey gjalda brúkaragjald?

Kommunan er fíggjarliga væl fyri í dag, men eg eri bangin fyri, um hetta óskilið at hækka raksturin heldur áfram, verður tað bara spurningur um tíð, til vit noyðast at taka lán aftur. Tað er sunt at svimja, hví ikki svimja ókeypis?

Annars haldi eg, at samgongan í Havn siglir uttan mið og mál. Tað verður ein kanin hálað upp úr hattinum nú og tá. Planlegging er ein býur í Kina. Meirilutin hevur ikki rygg til nakað sum helst.

Eg haldi, at borgarstjórin Heðin Mortensen átti at umhugsað at hoppa yvirum aftur í Sambandsflokkin.

## Skapanarverk, ikki skaparverk!!

**EYÐUN Á BORG**



Sálmur, ikki sálmi, lovsangur, ikki lógsangur, kirkjulið/samkoma ikki meinigheit!!

SKAPANARVERK: Fá munnu siga tað rætta, sum altso er skapanarverk, ikki skaparverk!

Danir siga "skaberværk", t.v.s. verk Skaparans.

Vit siga "skabelsesværk", sum eisini er til í donskum máli.

SÁLMUR: Hatta orðið verður ofta bent skeivt!

Tað bendist: sálmur, sálm, sálmi, sálms.

Tað bendist ikki: sálmi, sálma, sálma, sálma.

Dømi: Ein vakur sálmur (hvørfall).

Hon lesur ein sálm (hvønnfall).

Tað stendur í sálmi 91 (hvørjumfall).

Nógv siga: Tað stendur í sálma 91. Tað er ikki rætt!

Man tað vera danska orðið, salme, ið órógvar?

LOVSANGUR: Langt o, ikki ó: lóvsangur/lógsangur!

Orðið hevur neyvan nakað við lóg at gera.

MEINIGHEIT: Hví brúka hatta margháttliga donsk-týska orðið, tá vit hava tey vøkru, føroysku orðini: kirkjulið og samkoma?

Við andaligari málkvøðu

*Á Borg á Argjum*
*6. novembur 2006*

## Rættleiðing til Rana Wardum

**BILL JUSTINUSSEN**
løgtingsmaður



Tú skrivar í niðurgerandi lesarabrævi, at eg gav einum lurtara, sum ringdi inn í beinleiðis sending í Útvarpi Føroya, rætt, tá hesin samanber pedofili og samkynd. Eg fari hervið at avvísa, at eg havi samanborið hesar báðar bólkar, og eg havi heldur ikki tikið undir við teimum, sum samanbera slíkar. At eg ikki tímdi at brúka stuttu tíðina til at viðgera hansara persónligu upplivingar, eiga tú og øll at skilja. Men at tú skalt misnýta tað til at seta meg á skúlabonk og greiða mær frá viðurskiftum, sum hvørt mansbarn í Føroyum veit, avdúkar bert tíni skeivu motivir. Eg geri alt fyri at halda viðgerðini av uppskotinum um broytingar í revsilógini á einum sakligum støði, men tað hevur tú helst ikki áhuga í. Nei, Rani, eg hoyri ikki til tann bólkin, sum tú so inniliga ynskir, at eg hoyri til av teirri einføldu orsøk, at eg ikki eri so fordømandi fyri øðrvísihugsandi, sum tú ert.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14.00



**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.